## Stór afturgongd í Russlandi

Altjóða búskaparkreppan hevur havt sera stóra ávirkan í russiska búskapin. Dmitrij Medvedev, forseti, segði um vikuskiftið, at russiska framleiðslan er 9,5 prosent minni í ár enn í fjør. Hann segði, at hetta er sera álvarssamt, og at afturgongdin hevur verið væl størri, enn altjóða metingarstovnar høvdu væntað. Forsetin legði afturat, at stjórnin hevur tikið neyðug stig, sum hava forðað fyri, at afturgongdin bleiv uppaftur størri. Sambært BBC er tað serliga russiski ídnaðurin, sum er meint raktur av altjóða kreppuni.



## Trýsta Iran

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, sum er á rundferð í Evropa, var í gjár í London og tosaði við bretska starvsbróður sín, David Milliband. Kjarnorkuætlanin hjá iranska stýrinum var høvuðsevnið á fundinum. Aftan á fundin søgdu tey bæði, at tað er umráðandi, at Iran og altjóða samfelagið semjast um, hvat skal henda. Hillary Clinton segði við tíðindafólk, at heimurin fer ikki at bíða allar ævir eftir, at Iran vil skriva undir eina semju og gevst við sínum kjarnorkuvirksemi.

# Tobbi fekk sína Ann

**Hóast hann sigur seg vera stak óromantiskan, var tað ein fegin Tobbi sum fekk sítt ja frá Ann Ellefsen, tá tey bæði giftust leygardagin**

BRÚDLEYP
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Brúðarparið Tórbjørn Jacobsen og Ann Ellefsen, saman við sínum vaksnu børnun og lítlu abbadóttrini hjá Tórbjørn*

- Nú hava vit livað uppá polskt í fleiri ár, so tíðin var komin at fáa tað formliga uppá pláss, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum um vikuskifti giftist við Ann Ellefsen, studentaskúlalærara.

Vígslan var í Glyvra Kirkju, har presturin Meinhard Bjartalíð gifti tey bæði leygardagin. Aftaná var stór veitsla í samkomuhøllini á Studentaskúlanum í Hoydølum, har eini 180 fólk vóru við.

### »Nú eru tað vit bæði«

- Tað virkar kanska eitt sindur borgaligt at giftast, men vit vóru komin til markamótið, har vit fegin vildu siga fyri øllum at: »Nú skulu tað vera vit bæði«, sigur Tórbjørn.

Hann dylur tó ikki yvir, at hetta við at gera hjúnarbandið til nakað heilagt kann virka eitt sindur patetiskt, havandi í huga, at tað samstundis er so vanligt, at hjún fara frá hvørjum øðrum aftur.

- Men fyri okkum var tað kortini ein eksistentiell avgerð at taka, nú vit vildu staðfesta formligu samanrenningina okkara millum, sigur Tórbjørn, sum tó viðgongur, at hann ikki fór niður knæ at biðja um hondina hjá komandi konu síni.

Í heila tiki heldur hann seg ikki vera serliga romantiskan.

- Nei, avgjørt ikki. Men kanska er bara eri ov smæðin til slíkt. Í eini av talunum vildi ein í hvussu er vera við, at mítt framfýsna lyndi bara er eitt skálkaskjól fyri smædni, sigur Tórbjørn.

### Frálík veitsla

Saman við konuni Ann er Torbjørn sera fegin um brúðarveitsluna, sum eydnaðist avbera væl. Serliga glað eru tey bæði fyri góðu røðurnar frá vinfólkum og kenningum og undirhaldið, ið má sigast at hava verið rættiliga forkunnugt. Skaldið Jóanes Nielsen las nevniliga nakrar yrkingar upp, og eisini sang og spældi Martin Joensen nakrar av sínum sangum. Eisini skemtarin Hilmar Jan Hansen legði leiðina framvið, har hann heilsaðu brúðgóminum við at herma eftir honum, so gestirnir sótu í skellilátri.

Á matarlepanum stóð fiskasúpan til forrætt, lambskjøt til høvuðsrætt og omaná var Tiramisu. Leskiligа máltíðin var tann seinasta, sum Leif Sørensen borðreiddi við sum kokkur á matstovuni Gourmet, ið lat aftur um vikuskifti.

Enska dansitónleikin syrgdi bólkurin Thunderbirds úr Vestmanna fyri, og so varð annars farið uppá gólv, har 'brúðarvísan gekk sum ongantíð fyrr', sum ein sera fegin og nýgiftur Tórbjørn Jacobsen tekur til.

# Áhugin lokkar fólk til Føroyar – ikki prísurin

**- Prísurin á ferðaseðlinum hevur ikki so stóra tydning. Fólk ferðast til Føroyar av áhuga. Tað sigur svenska ferðavinnu blaðkvinnan Karin Wallén, sum saman við einum myndamanni hevur kanna Føroyar sum ferðamannaland fyri fleiri svensk bløð**

FERÐAVINNA
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Kendasta blaðið Karin Wallén skrivar fyri er óivað Vagabond, sum er størsta ferðamannablaðið í Svøríki. Sjálv ferðast hon til umleið tíggju ymisk lond árliga.

***Er hetta tín fyrsti túrur til Føroya?***

- Ja, men so avgjørt ikki tann síðsti.

***Hvussu dámdi tær at lenda í Føroyum?***

- Tað var vakurt at síggja hesar grønu tindarnir stinga seg upp úr havinum. Eg havi lent á nógv verri støðum, so eg hugsaði ikki um at flogbreytin var stutt.

***Hvat er størsta upplivingin higartil?***

- Tað er avgjørt at vera á fjalli við Absalon Hansen. Eg kendi meg sum eina flugu á vegginum, ið kundi eygleiða henda sjónleik, sum tað er at fáa seyðin inn.

***Hvat hava tit etið, meðan tit hava verið her?***

- Vit hava leitað eftir einari góðari fiskamatstovu, men ikki funnið nakra. Vit hava etið slíkt, sum ein kann eta allastaðni, so sum pitsa og salat. Eg hevði vilja roynt grind, lunda og tosk.

***Minnur Føroyar um nakað annað land tú hevur ferðast í?***

- Eg haldi at Føroyar líkjast nógv Irlandi og Baskaralandið í Spania. Eisini er tað rættiliga líkt svensku fjøllunum.

***Hvat heldur tú kann gera Føroyar til eitt enn betri ferðaland?***

- Tit kunnu útbyggja tað tit hava - nevnliga eina fantastiska náttúru. Ger gonguleiðir á fjøllunum við hyttum, har til ber at gista. Hvalasafari er nógv brúkt á Íslandi, so hví ikki?

***Hvat heldur tú um ferðaseðlaprísin?***

- Sjálvandi kunnu vit sum sviar koma sera langt fyri pengarnar, sum tað kostar at koma til Føroyar. Men her kemur man, tí man er áhugaður, og tí vænti eg ikki, at prísurin er tað avgerandi, tá ein fer til Føroya.

***Hvat fert tú at skriva um Føroyar?***

- Eg skrivi fyri trý ymisk bløð, ein grein verður um Absalon Hansen og hansara hundar. Ein grein verður um, hvussu tað er at arbeiða í Føroyum sum svii, og so ein stór grein um okkara "roadtrip" gjøgnum landið fyri Vagabond.

***Hvar ber leiðin aftan á henda túrin?***

- Mær dámar væl at ferðast til øðrvísi lond. Ein dreymur er at fara til Svalbard og Grønland.

**Fakta Karin Wallen**
**Aldur:** 36
**Starv:** ferðavinnu blaðkvinna fyri ymisk svensk bløð




*Karin Wallén skrivar fyri ferðamannablaðið Vagabond*

**Bústaður:** Stokkholm
**Lond sum hon hevur vitja higartil í ár:** Týskland, Teiland, Namibia, Kanada, Grikkaland, Skottland, England/Wales, Norra og Føroyar